*Orð: Anna V. Ellingsgaard*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Sorgblítt farvæl

"Góðu ferðafólk. Vit biðja orsaka seinkingina av Tvøroyri. Veðrið á veg suðureftir og lastingin av skipinum hava seinkað okkum nakað. Norðuraftur til Havnar verður veðrið av tí besta. Skipari og manning ynskja ferðafólki ein góðan túr" Soleiðis ljóðaði úr hátalaranum á einum av seinastu túrunum við gamla Smyrli. Hóast fleiri av ferðafólkunum noyddust at finna sær spýggibakkan fram, sá veðrið ikki út til at órógva manningina stórvegis. 18 fólk sigla vanliga við Smyrli, og fyri tey øll bíðar ein rættiliga kollveltandi broyting fyri framman á teirra arbeiðsplássi, tá nýggi Smyril fer í sigling. Spenningurin er stórur, men tað er samstundis við sorgblídni at óvanliga trúfasta manningin sigur farvæl við gamla skipið.



*Kettur kunnu eisini fáa sjóverk, og Mollie sá takksom út, tá hon fekk ein spýggibakka*

## Farleiðin skal verða ein »landavegur«



Hans Petur Nielsen er av Tvøroyri, men býr og arbeiðir í Havn. Hann er ikki ein av teimum, sum ferðast mest við Smyrli, men fer tó javnan ein túr til heimbygdina, sum til dømis hendan dagin, hann fer suður at hyggja sær eftir seyðinum.

Nú nýggi Smyril er á veg, vónar Hans Petur, at tað fer at eydnast at leggja Suðuroyarleiðina í eina so mikið fasta legu, at hon mest sum kemur at virka sum ein landavegur, tú altíð veist er klárur at brúka.

- Sum er, eru tað ov nógvar broytingar á hesi farleiðini, og tí tykist hon nakað óstøðug. Eisini undrar tað meg stórliga, at Smyril siglir færri túrar um høgtíðirnar, enn vanligt. Tað átti at verið øvut, tí tørvurin á at ferðast er ongantíð størri enn júst um høgtíðirnar, sigur Hans Petur og sipar í hesum viðfangi til nógva tosið um, at frástøðan til Suðuroynna fer at minka við einum betri og størri skipið

- At minka um frástøðuna snýr seg ikki bara um at koma skjótari fram, men eisini um, hvussu ofta tú hevur møguleikan at ferðast fyri ein rímiligan prís, sigur Hans Petur, sum heldur tað átti at verið upplagt at nýggi Smyril kemur at sigla tríggjar túrar um dagin. Um so verður, væntar hann eisini at hann fer at ferðast oftari til Suðuroy, tí við verandi ferðaætlan, er tað ov ofta, at tú ikki sleppur heimaftur sama dag.



*Gamli Smyril hevur verið eitt framúr gott arbeiðspláss, eru dámurnar umborð samdar um. Og árini, tær hava silgt við, eru ikki so fá. Frá vinstru eru tær Emilia Olsen, sum hevur verið við í 25 ár, Randi Jacobsen í 9 ár, Fingerð Christiansen í 18 ár, Maureen Andreasen í 6 ár og Ranvá Roest, sum er eykahjálp*

## Trúfastar dámur

Dámurnar, sum dagliga starvast umborð á Smyrli eru sera spentar uppá, hvussu teirra nýggja arbeiðspláss kemur at síggja út og virka. Enn hevur ongin av teimum sæð nýggja Smyril, men tær hava frætt, at ymiskt er, sum verður rættiliga nógv øðrvísi.

**Sjálvtøkuborð**

Til dømis verður ikki longur neyðugt hjá ferðafólki at standa í kø fyri at koma fram at úrvalinum av mati. Úrvalið verður skipað sum eitt sjálvtøkuborð, og tað fer at lætta munandi um trýstið, sum ofta er frammanfyri kassan, heldur kassadáman.

Eisini verða køkur og kafeteria á somu hædd umborð á nýggja Smyrli, so tað ikki verður so nógv gongd hjá køksgentunum millum hæddirnar, sum nú. Framyvir er eisini ætlanin, at arbeiðsgongdin verður skipað í skiftum millum tey ymsu catering arbeiðsøkini. Hetta fer at gera arbeiðsgongdina liðiligari vænta tær, tí tað tá verður lættari hjá eini at traðka til, um tað berst onkrari frá.

**»Tað reina luksus«**

Eisini Maureen, sum starvast í kioskini, er sera forvitin eftir at vita, hvussu hennara starv fer at verða. Sum er, verða bæði ferðaseðlar og kioskvørur seldar í kioskini, og hetta kann til tíðir vera sera strævið. Men framyvir verða ferðaseðlarnir seldir í nýggja terminalinum.

Annars gleða tær allar seg serliga nógv til nýggju kømurini, sum øll hava egið baðirúm og eru á miðdekkinum. Tað verður vorðið sum luksus, vænta tær, afturímóti núverandi kømurnum, sum eru undir bildekkinum, og har tær eru noyddar at standa í kø, tá tær skulu undir brúsu.

